# Seta spakan í fyrsta dagin til skúladepilin í Suðuroy

**Heilt skjótt verður arbeiðið at gera grundstykkið byggibúgvið, boðið út og í summar skal sjálv byggingin byrjað**

SKÚLADEPIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Arbeiðið at fyrireika byggingina av nýggja skúladepilin í Hovi gongur væl og fyrsta dagin verður fyrsti partur av arbeiðnum boðin út.

Eyðbjørn Poulsen á Mentamálaráðnum, sigur, at nú eru næstan øll loyvi fingin til vega.

Grundstykkið er útvegað og Porkeris Kommuna hevur givið byggiloyvi til skúlan. Nú verður bara bíðað eftir eini skrivligari váttan frá friðingarmyndugleikunum um ætlanina.

Hann vónar, at tað verður nú rundanum páskini at boðini koma frá friðingarnevndini um, at ætlanin er góðtikin.

Hann sigur, at í løtuni verður arbeitt við at gera projektið liðugt í sambandi við byggibúningina.

– Ætlanin er so at arbeiðið at gera grundstykkið byggibúgvið, skal bjóðast út so skjótt, tilsøgnin frá friðingarnevndini kemur og tað verður vónandi nú rundanum páskinki.

– Tað verður lýst í bløðunum, men tíðarfreistin verður stutt, tí ætlænin er at taka støðu til tilboðini so skjótt sum gjørligt eftir páskir, so at farast kann undir sjálvt arbeiðið fyrst í mai mánaði.

Eyðbjørn Poulsen sigur, at ætlanin er, at arbeiðið at gera grundstykkið byggibúgvið, skal vera liðugt á Ólavsøku.

Samstundis verður arbeitt við fullari megi at projektera sjálvan skúlan og ætlanin er at bjóða sjálvt byggiarbeiðið út í mai, ella í øllum førum fyri summarfrítíðina.

– Vit ætla at bera so í bandi, at tá ið grundstykkið er byggibúgvið á Ólavsøku, skal vera klárt at fara undir at byggja sjálvan skúlan so at arbeiðið kann halda fram uttan íhald.

Arbeiðið at byggja sjálvan skúlan, verður bjóðað út í eini heildarútbjóðing og tað verður sostatt alt bjóðað út undir einum.

Hann sigur, at sostatt heldur tíðarætlanin, sum tey hava lagt og endamálið er framvegis, at skúlin skal verða liðugur fyrsta januar 2008.

Skúladepilin í Hovi skal húsa studentaskúlanum í Suðuroy og heilsuskúla Føroya, sum nú er á Tvøroyri.

Men ætlanin er eisini at musikkskúlin skal hava høli í skúlanum til framførslur og og serlig tiltøk. Vanlig undirvísing í musikkskúlanum verður ikki í Hovi, men møguleikar verða fyri serligari undirvísing og venjingum, har næmingar úr allari oynni verða savnaðir ávísar dagar.

Miðnámsskúlin í Suðuroy verður ein sjálvstøðugur stovnur við egnari leiðslu.



*Soleiðis fer nýggi skúladepilin í Hovi at síggja út og fyrirreikingarnar ganga sum ætlað. Sostatt verður arbeiðið at gera grundstykkið byggibúgvið, boðið út fyrsta dagin og í mai er ætlanin at bjóða arbeiðið at byggja sjálvan skúlan*

# Børn og ung á Tvøroyri fingið eitt fyrstafloks spæli- og lærupláss

**Fyrsti sparkivøllurin í Suðuroy eru nú gjørdur á Tvøroyri**

SPARKIVØLLUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hetta verður børnunum og teimum ungu á Tvøroyri eitt gott spæli- og lærupláss.

Við hesum orðum handaði Óli Holm, formaður í Fótbóltssambandi Føroya Tvøroyrar býráð ein spildurnýggjan sparkivøll við snotiligum graslíki á.

Hetta er ein av teimum smáu sparikivøllunum, sum evropiska fótbóltssambandi, UEFA, letur sín ríkiliga stuðul til at gera víða hvar fyri at hátíðarhalda 50 ára dagin hjá felagsskapinum.

Eisini í Føroyum eru fleiri slíkir smávøllir gjørdir og nú er so tann fyrsti eisini í Suðuroy tikin í nýtslu á Tvøroyri.

– Endamálið er eisini at stimbra áhugan fyri fótbólti og at stuðla upp undir menningina, segði Óli Holm.

– Hesir smái vøllirnir eru við at geva óvitum og ungum ein eyka møguleika at menna fótbóltsevnini, legði hann afturat.

Tilsamans eru og verða einir 40 slíkir smávøllir gjørdir kring landið við stuðuli frá UEFA, Fótbóltssambandi Føroya, Skipafelagnum, Landsstýrinum og Løgtinginum.

Eisini Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyi fegnaðist um hendan nýggja vøllin.

Tá ið hann tók ímóti vøllinum, heitti hann á øll í Suðuroy, sum íðka ítrótt um ikki at síggja kommunumark sum eina forðing, men at fara útum mark.

– Finna ítróttarfeløgini saman, hevði tað ongantíð verið betri um kommunurnar fylgdu eftir, segði hann, tí skal Suðuroy aftur í fremstu røð, gerst tað bert við at leggja saman.

Síðani handaði borgarstjórin landsliðsskiparanum og TB`aranum, Óla Johannesen sparkivøllin til at lata víðari til børnini og ungdómin á Tvøroyri og allari oynni, sum hann segði.

Eitt sindur av fólki varð komið saman, tá ið vøllurin varð handaður og aftaná fór allur riðilin inn í ítróttarhøllina at fáa okkurt leskiligt.



*Teir fegnast um avbera snotiligasparkivøllin á Tvøroyri, frá vinstru eru tað Pauli Einarsson, býráðslimur á Tvøroyri, Kristin Michelsen, borgarstjóri, Óli Holm, formaður í Fótbóltssambandinum og Óli Johannesen, liðskipari á landsliðnum*

# Børn og ung Vági fáa egin hús

**Týskvøldið samtykti Vágs Býráð at keypa eini hús í Vági til ymiskt virksemi hjá børnum og ungum í býnum**

BØRN OG UNG
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Børnini og ungdómurin í Vági fáa nú síni egnu hús.

Týskvøldið samtykti Vágs Býráð endaliga at keypa eini hús í Vági til ymiskt virksemið hjá børnum og ungum.

Talan er um eini hús, sum Tryggingarfelagið Føroyar eigur í Vági og sum Vágs Býráð kann fáa til keyps fyri 275.000 krónur og týskvøldið samtykti býráðið at játta pening til endamálið.

Tað er ein bólkur, sum hevur arbeitt við korunum hjá børnum og ungum í visjón 2010 hjá Vágbingum, sum eisini hevur arbeitt við at bøta um umstøðurnar hjá børnum og ungum.

Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri í Vági, sigur, at hesin sami bólkur skal nú stinga út í kortið, hvat virksemi skal vera í húsinum, men tað er í øllum førum hampiliga greitt, at húsið skal brúkast til musikkskúla og ungdómshús.

Møguliga skulu umvælingar og broytingar gerast, men tað er kommunan eisini sinnað til.

Musikkskúlin húsar undir sera vánaligum umstøðum í gomlu kommunuskrivstovuni, men hon er so skirvisligt, at hon rætt og slætt stendur til at rapa og hon er í so ringum standi, at tað loysir seg ikki at umvæla hana og tískil hevur býráðið samtykt at taka hana niður.

Miðnámsskúlin hevur eisini bókagoymslu í gomlu kommunuskrivstovuni, men roynt verður nú at finna annað goymslupláss og borgarstjórin sigur, at ætlanin er at royna at taka húsið niður fyri jóansøku.



*Í hesum húsinum í mitt í Vági verður nú ungdómshús og musikkskúli*